

**Góði Einar abbon umborð á Rasmus Effersøe**
Hjartaliga tillukku við 55 ára degnum 9. des. og alt gott í framtíðini ynskja vit tær.
**Kærastu heilsanir, Einar og Hjalmar**



**Góði Ragnar**
Her er lagið ikki so gott, men nú er betur. Tillukku við 25 ára degnum, elskaði Ragnar. Harrin veri hjá tær.
**Kærastu heilsanir, omman**



**Góða, elskaða langa**
Eg ynski tær hjartaliga tillukku við 75 ára degnum í dag. Takk fyri alt. Eg elski teg.
**Heilsan, lítla Karin**



**Góðu, fittu Hanna og Elisabet**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan, mamma og babba**



**Góði maður, pápi og verpápi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum í dag. Takk fyri alt tú er fyri okkum.
**Kærastu heilsanir, kona, børn og verbørn**





**Góða kona, mamma, omma og langomma**
Hjartaliga tillukku á føðingardegi tínum 15.10.01. Vælkomin heimaftur munandi raskari.
**Heilsan, kakerlakkarnir**



**Góða Hanna! (árg. 51)**
Hjartaliga tillukku við teim ? árunum 9. des. Alt gott í framtíðini.
**Bestu heilsanir, hin á myndini**



**Góði, fitti Tóki**
Hipp hipp hurrá – 8 ár, tillukku við føðingardegnum ynskja
**Hørður & Lý**



**Elskaði abbi og ommubeiggi**
Hjartaliga tillukku við døgunum 8. og 11. des. Takk fyri at tú, abbi, altíð er so góður við okkum og tímir at ansa eftir okkum.
**Kærastu heilsanir, Thordis, Tróndur og Torkil**



**Góða, elskaða Maria**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum.
**Bestu heilsanir, mamma, babba og Anna**



# TILTØK

## FØÐINGAR

27. november fingu Sára Ripley, Vágur og Halgir Poulsen, Porkeri, ein son. Hann var 46 cm. langur og vigaði 2750 gr.

28. november fingu Elspa Petersen og Skylv Hartvigsson, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2685 gr.

28. november fingu Kariann og Herleif Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3000 gr.

29. november fingu Britt og Kári Kristiansen, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3250 gr.

29. november fingu Anita Hammer, Funningsfjørður og Jan Højgaard, Saltangará, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4565 gr.

30. november fingu Marin og Tonny Brimsvík, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3800 gr.

30. november fingu Katrin Lindberg og Rúni Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

1. desember fingu Hans Hammer og Janni Johansen, Brøndby, eina dóttur. Hon var 58 cm. long og vigaði 4500 gr.

2. desember fingu Sigrið Højsted og Sjúrður Horsdal, Hoyvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3350 gr.

3. desember fingu Fía og Steinfinn Jacobsen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4500 gr.

4. desember fingu Ása og Símin Ósá, Argir, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4000 gr.

5. desember fingu Elin Sólsker og Andras Hansen, Æðuvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3965 gr.

## ANDLÁT

**28. november**
Oddur Arge, Tórshavn, 70 ár.

**30. november**
Estrid Kjærbo, í Vági, 74 ár.

**02. desember**
Elisabeth Danbjørg, vanliga nevnd Betta í Skúla, Porkeri, 98 ár.
Ragna Tauser, í Nýlendinum í Vági, 69 ár.

**04. desember**
Alvilda Petersen, Klaksvík, 63 ár.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 8. des.: Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038
Sunnudagin 9. des.: Hálvdan Simonsen, tlf. 441490

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

## PRÓGV

Niels Petur Olsen, Norðasta Horn, Tórshavn, hevur lokið prógv sum koyrilærari á Koyriskúlanum í Fredericia.

Vónbjørt Thomassen, Eiði og Teresa Jarnfoss, Tórshavn, hava lokið prógv sum sjúkrasystrar á Hvidovre Hospital.

## 70 ÁR

Týsdagin 4. desember fylti Helga Mikkelsen, Runavík, 70 ár. Dagurin verður hildin í dag, leygardagin, í kappróðrarneystinum hjá Tjaldur, frá kl. 19.00.

## 80 ÁR

Mánadagin 10. desember fyllir Katrina Einarsson, 80 ár. Dagurin verður hildin í Arbeiðsmannafelagshúsinum »Hæddini« tann 9. des. frá kl. 15.00.

### Gudstænastur leygardagin 8. desember

*Jólahugni* fyri eldri í kirkjukjallaranum í Klaksvík kl. 15 v/ Hans Eiler Hammer o.ø.

**2. sunnudag í advent**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Deyvagudstænasta, Jónsvein Bech
*Kaldbak:* kl. 12, Sonja Klein, altarg.,
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Norðskáli:* kl. 17, ljósgudstænasta
*Funningur:* kl. 19 ljósgudstænasta, Emil Olsen. (Talvan gongur á Eiði fyri hina Føroysku Sjómanskirkjuna)
*Elduvík:* kl. 17, altarg., Uni Næs
*Eiði:* kl. 12, John Myllhamar
*Selatrað:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Prestainnsetan, Bjarni Bæk innsetur Martin Restorff Jacobsen
*Klaksvík:* kl. 11, lestur
*Mikladalur:* kl. 12, altarg., Niels P. Danielsen
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Peder O. K. Olofson
*Kirkja:* kl. 12, altarg.,
*Hattarvík:* kl. 17, altarg., Elsa Funding. Um ikki viðrar, so verður gudst. í Svínoy kl. 12 v/ altarg.
*Viðareiði:* talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Bøur:* kl. 12, David Johannesen
*Leiti:* kl. 12, Marianne Telling
*Skúvoy:* kl. 12, altarg., Jákup Reinert Hansen
*Sandvík:* kl. 12, Ólavur Rasmussen

### KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin kl. 16.45 í KFUK: Eldrasamkoman. Inngangur við Sverra Steinhólm presti. Títtlingar framføra jólaleik, og vit fáa nátturða.

### Hebron, Argir

Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti. Páll Poulsen talar um Heb. 13.3. »At minnast fangar og tey, ið ilt líða«.

### Kirkju og missiónshúsið á Argjum

Jólatræ verður fyri børnum leygardagin 8. desember. Børn undir skúlaaldur kl. 16.00. Børn í skúlaaldri kl. 19.00. Jólafestin fyri tey vaksnu verður sunnukvøldið 9. desember kl. 19.00.

### »Tíð til Gud«

verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Seinasta »Tíð til Gud« møti í hesum árinum. Á skránni verður millum annað Rís á la mande og drama. Verið hjartaliga vælkomin.

### Rhema á Hálsi

Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og Sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

### Sjómanskvinnuringurin í Havn

kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið 10. desember kl. 20.00. Sjómanskvinnuringurin á Argjum verður við.

### Katólska kirkjan

Hósdag kl. 20.00 verður Taizé-kvøld í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa í Mariukirkjuni.
Mánakvøld kl. 20.00 verður adventsgudstænasta (við bótarinnar sakramenti) í Mariukirkjuni.
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.

### Frelsunarherurin, Tórshavn

Sunnudagin kl. 11.00 Møti, Súni Rasmussen talar, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti, Palli Petersen talar.
Mánadagin kl. 17.00 og 19.00 Skótamøti.

### Meinigheitshúsið

Sunnudagin kl. 15.00 Jólafest fyri børnum undir skúlaaldur, kl. 18.00 Jólafest fyri børnum í skúlaaldri.
Mánakvøldið kl. 20.00 venur Manskórið.

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin kl. 14.00 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti og kl. 18.00 Møti við Jógvan Lamhauge, Ova Láaberg og Mourits Viderø syngur. Øll eru vælkomin.

### Ebenezer

Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. kl. 21.00 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Hvítusunnusamkoman

*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

### Filadelfia

*Landavegur 22*
Í dag kl. 17.00 Landsbøn, kl. 19.30 Jólaveitsla fyri vaksin.
Í morgin kl. 16.00 Jólaveitsla fyri øll.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti.

### Filadelfia, Sundalagið

Mikudagin kl. 18-19.30 Miðdepilin.
Hósdagin kl. 17.30 Jólafest – Miðdepilin og Urtagarðurin.

### Hvalvíkar missiónshús

Sunnudagin kl. 14.30-19.00 Jólaveitsla fyri vaksin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði

Leygardagin kl. 17.00 Barnajólafest, kl. 21.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Paula Høj, kl. 17.00 Barnamøti.

### Meinigheitshúsið á Skála

Sunnudagin kl. 17.00 verður nýggja Meinigheitshúsið vígt av Jógvan presti. Niels J. Nielsen trúboðari talar. Barnakórið og lovsongsbólkur syngur. Innsavning til húsið. Aftaná verður borðhald. Eingin sunnudagsskúli kl. 13.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Ørkin, Saltangará

Einki møti verður sunnudagin í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará, av tí at høli verður nýtt til onnur endamál. Húsmøti verður týsdagin kl. 19.00 hjá Jonnu og Palla Højgaard, Saltangará. Verið hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Gøtu

Týsdagin kl. 20.00 Bíbliuundirvísing. 1. Kor. kp. 7,1-16 v/ Peter O. K. Olofson.

### Siloa, Fuglafirði

Sangmøti við sangkórinum í Siloa verður sunnukvøldið kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Lívsins Orð

Jólahugni fyri Liljurnar, Tim 5 og annars øll børn verður leygardagin kl. 14.30.
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við Thormund Hansen.

### Soli Deo Gloria

Mikumorgunin kl. 6 Bøn.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Alpha skeið.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Fríðtór Debes.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bíbliutími/bøn.

### Aglow, Klaksvík

Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 8. des. kl. 20.00. Øll eru vælkomin.

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við John og Tove Hammer. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Café One Way, Tvøroyri

Leygarkvøldið verður latið upp kl. 21.00. Sámal Jákup og Elisabeth Joensen luttaka.

### Missiónshúsið í Vági

Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kakao og bollar, kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskur fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Týsdagin kl. 20.00 Ungdómsfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

### Frelsunarherurin, Vágur

Fríggjadagin kl. 21.00 Sangvenjing.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 verður jólatræið tendrað. Aftaná verður kakao og bollar at fáa í Framtíðini. Mánadagin kl. 20.00 Heimaforbundið (jólahugni).

### Dagtilhaldið Fløvin

heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Náði mín er tær nóg mikið, tí at mátturin verður fullkomin í máttloysi.«*

*2 Kor. 12,9*

Hvat er okkum nóg mikið, hvat seta vit álit okkara á og hvat vilja vit rósa okkum av. Hettar vórðu spurningar, sum Paulus apostul eisini kendi, og sjálvt um hann var greiður yvir, at hann hevði nógv, sum hann kundi peika á og rósa sær av, so hevði hann lært at meta tað, sum gav honum fyrimun fram um aðrar jødar ella heidningakristin, sum einki at rokna móti tí eina, at kenna Kristus og verða kendur av honum.

Vit kundu helst eisini nevnt ymiskt, sum als ikki er at vanvirða í okkara lívi.

At hava fingið eina kristna uppaling við gudsótta og virðing fyri tí sum heilagt er, góðar umstøður í landi og samfelag, góðar vinir, góð arbeisðviðurskifti, góða heilsu og annað.

Alt hettar og so nógv annað hava vit góðar grundir til at takka Gudi fyri.

Men tað er nakað sum ber av øllum hesum, og tað er Guds náði sum kom til okkara í Jesusi Kristi.

Tað er dýrasti gripur, sum okkum er givin at eiga og gleðast yvir.

Og hendan dýrgrip kunnu vit bert tilognað okkum við trúnni á Jesus Kristus. Og hava vit tilognað okkum hesa trúgv, so kunnu vita siga: Hvat er tað ikki gott at kenna Kristus, og so verða kendur av honum.

Sig kennir tú tað vakra Jesunavnið
Gud til frelsu okkum gav
Um allan heim tí mannatungur prísa
Yvir hvørt eitt land og hav.

Navni sum av øllum ber er Jesus
Tað lýsir framman fyri stavn
Tí einki annað navn kann okkum frelsa
Einki, einki annað navn.

**Regin Høgnesen**